# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Ov rík til at vóna? Kl. 11.00 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 14.00-16.00 Jólaverkstaður fyri alla familjuna. Vit tilevna jólapynt og eta rísingreyt saman.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, Elisabeth Joensen talar. Vit syngja jólini inn kl. 17.00 Lusia, framsýning og drekkamuður. Øll eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*Uppi á Brekku 3*
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Í kvøld kl. 20.00 After Eight. Sunnudagin onki møti. Sunnudagsskúlin skipar fyri jólaveitslu í Hoyvíkar skúla kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 verður jólahugni fyri teimum ungu. Eingin sunnudagsskúli og Juniormøti.
Sunnukvøldið kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Margreth Olsen.

**Lívdin**
Samkoman Lívdin hevur familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti, kl. 12.00 hvønn sunnudag í Hoyvíkar skúla. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 15.00 Jólafest fyri børn undir skúlaaldur og kl. 18.00 fyri børn í skúlaaldri.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti. Øssur Andreasen talar.
Heimasíða www.hebron.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Í annaðkvøld kl. 19.00 Jólaveitsla fyri øll.
Sunnudagin kl. 16.00 Jólaveitsla – sunnudagsskúlin og Delli.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Aglow-møti í Kvívík**
Aglow-møti verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið kl. 20.00. Bæði kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Glæman í Kvívík**
Sunnudagin kl. 19.00 Møti við Remi Didriksen o.ø. Gittit syngur.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti v/ Fríðbjørn Poulsen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, onki møti vegna møti í Kvívík.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 og jólafest fyri børn kl. 17.00. Ungdómsmøti verður mánadagin kl. 20.00.

**Keldan,Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Malmberg Olsen. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli í Thabor og á Kambsdali. Møti er kl. 18.00 við Frants Jensen. Innsavnan til Heimamissiónina. Ungdómsmøti er kl. 21.00.

**ELIM**
Vikuskiftismøti verður í Kelduni í Skálavík 13.-15. des.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Evangel. møti.
Leygardagin kl. 14.00 Bíbliuundirvísing við Zacharias Zachariassen. Evni: Joh. ev. – Endurføðingin, tryggleiki, eftirfylgjandi ávøkstur.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 14.00 Evangel. møti. Talarar: Z. Zachariassen, Símun Pætur á Torkilsheyggi, Hjørleif Vang, Gullak Madsen o.a. Sangkreftir úr Havn. Kaffi eftir møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Hugnakvøld fyri sjómonnum, útróðrarmonnum, egnarum og øðrum, í bygdunum Leirvík, Gøtu og Fuglafirði verður í missiónshúsinum í Leirvík leygarkvøldið kl. 20.00. Á skránni: Sangur, andakt, filmur um Hvilvtenni, spurnarkapping, drekka og burturluting. Hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Jólahugni fyri ung.
Leygardagin kl. 15.00 Jólafest fyri børn.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti/Alpha skeið. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Jólafest (ongin sunnudagsskúli). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Samljóð í Skopun**
Jólafestin hjá Betania verður sunnudagin kl. 16.00 í Samljóð. Børnini luttaka við spæli, sangi o.ø. Tit eru so hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Sunnudagsskúlakortini verða innheintaði. Einki møti um kvøldið vegna familjugudstænastu kl. 19.00 við luciagongd.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Onki ungdómsmøti verður leygarkvøldið.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Sigrið og Denny. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Ebba og Nimrod Midjord tala og syngja.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Bøkurnar verða innheintaðar, kakao og bollar. Kl. 18.00 Møti við Hallur Ludvig og Terja Nielsen, Mourits Mohr Viderø syngur, vælkomin.
Leygardagin kl. 16.30 verður andakt á eldrasmbýlinum.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Jólahald í Randers**
Jólahald verður í Randers missiónshúsi (St. Blichersgade 1 c) leygardagin kl. 15.30. Jólaboðini, jólasangir, jólatræ, gávur til børnini, kaffi o.a. verður á skránni. So vælkomin til jólahald í Randers.

**Jólahugni í Hirtshals**
Jólahugni verður fyri allar føroyingar í Hirtshals missiónshúsi sunnudagin 15. des. kl. 18.00. Jólaboðini og sangurin vil ljóða. Jólatræ, kaffi og okkurt til børnini verður eisini. So vælkomin til jólahugna í Hirtshals missiónshúsi.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319130/61 655400.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 9. des.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Gera jólaprýði og dekoratiónir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobbspæl, dart og onnur spøl.
*Týsdagin 10. des.:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, jólasangløtan. Kakao og bollar (tilhaldskokkarnir)
kl. 15 »Misskiltar føroyskar/danskar skemtisøgur«
*Mikudagin 11. des.:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Suomi – Finland, Hanna Niinimaa
*Hósdagin 12. des.:*
kl. 10-10.30 Jólafimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 13. des.:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 14 Stásið vísir stás

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

## GULLBRÚDLEYP

Fríggjadagin 13. desember hava Malla og Hákun Magnussen, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Tey ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið eru henda dag vælkomin til ein morgunmatarbita í hølum Starvsmannafelagsins í J. H. Schrøtersgøtu 9 millum kl. 10.00 og 14.00.

## 80 ÁR

Í dag, 13. desember verður Olga Vágslíð, Klaksvík 80 ár. Dagurin verður hildin í Uppsalagøtu 8 frá kl. 19.00.









Sundsvegur 8 - 100 Tórshavn - Tel 31 38 09 - Fax 31 04 39




# FILMSTEIGURIN

## My big fat greek wedding

Aphrodite, kærleikans og vakurleikans gudinna, hevur ikki verið serliga vinarliga móti Toula Portokalos (Nia Vardalos). Við sínum keðiliga og sjaskuta hárið og tjúkku brillugløsum er hon framvegis ógift sum 30 ára gomul. So øll hennara stóra og harðmælta familja er bekymrað um hana…

Hon arbeiðir sum servitrisa á matstovuni hjá foreldrunum, Dancing Zorba, men dagdroymir um at flýggja frá foreldranna dagligu men kerligu umsorgan fyri henni.

Men Apollo hevur gjørt Toula gløgga og tann ljóti dunnuungin sær, at einasti vegur burtur frá elskaðu familjuni, er at hon umskapast til ein vakran svana. Hon broyti útsjónd, fer at lesa KT – og sjálvsálitið veksur støðugt og róliga fyri hana hvønn dag. Og við hjálp mammunnar sleppur hon – av sínum kerliga, men dominerandi pápa, at arbeiða á ferðastovuni hjá tantuni… og tað er bara lagnan hjá henni.





## Ringanna Harri Ævintýrið um ringin

Vit hittan tann heldur sjenerta hobban, Frodo Sækker, sum arvar ein ring frá stjúkpápa sínum, gamla Bilbo Sækker. Men talan er ikki um hvønn sum helst ring, tí tað er sjálvur Ringurin, ein gandasmíðaður gullringur við óavmarkaðum valdi, sum kann søkkja Sauron, myrkursins herskara í Mordor, meginini til at ráða yvir øllum Miðgarði og at trælabinda allar tess skapningar.

Tað einasta, ið kann steðga honum, er um tað eydnast Frodo og lítla bólki hansara av trúføstum vinum at føra Ringin trygt gjøgnum Miðgarð til Dómadagsspalturnar í djúpa Orudruin, Eldfjallinum, har hann í sínari tíð varð smíðaður, og har – í óndskapans hvítgløðandi hita – leggja hann í oyði einaferð fyri allar.

Men áðrenn teir koma so langt, skulu teir á eina ræðandi ferð inn í fíggindans…




**Frumsýning**
Fríggjadagin 13.12. kl. $23^{00}$ Leygardagin 14.12. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 15.12. kl. $22^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




**Endurfrumsýning**
Fríggjadagin 13.12. kl. $19^{15}$ Leygardagin 14.12. kl. $19^{15}$
Sunnudagin 15.12. kl. $18^{30}$




Fríggjadagin 13.12. kl. $23^{30}$ Leygardagin 14.12. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 15.12. kl. $22^{45}$




Fríggjadagin 13.12. kl. $17^{00}$ Fríggjadagin 13.12. kl. $20^{15}$
Leygardagin 14.12. kl. $17^{00}$ Leygardagin 14.12. kl. $20^{15}$
Sunnudagin 15.12. kl. $16^{15}$ Sunnudagin 15.12. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 13.12. kl. $17^{15}$ Leygardagin 14.12. kl. $17^{15}$
Sunnudagin 15.12. kl. $16^{30}$

**KOMANDI FILMUR**




**Heimsfrumsýning**
Mikudagin 18.12. kl. $18^{30}$ Mikudagin 18.12. kl. $22^{15}$